

VÍNTÚR TIL ITALIA VIÐ VÍNKÚLLUNUM & KIM

TÚRUR 1: 23-30. JUNI 2027
TÚRUR 2: 11-18. AUGUST 2027
TÚRUR 3: 18-25. AUGUST 2027

KEMUR TÚ VIÐ

BÍLEGG NÚ Á VINKULLARNIR@GMAIL.COM
ELLA RING Á TEL. 504444 / 220030

VÍNKÚLLARNIR

HUGNATÚRAR
GÓÐSKA - TÆNASTA - HUGNI

VÍNKÚLLARNIR Á VÍNFERÐ OG KIM ER ALTÍÐ VIÐ




















Hvat er íroknað:

- Flogferð við Atlantic Airways, Vágar – Milano – Vágar
- Øll ferðaavgjøld (turistskattur á 4x2€ skal tó gjaldast á hotellinum)
- Bussur til og frá flogvøllinum og til ymsar útferðir
- 4* Hotell uppihald í 7 nætur
- Morgunmatur
- Nátturði á hotellinum fyrsta kvøldið
- Svimjihylur við tilhoyrandi sólstólum
- 2 víngarðsvitjanir við vínsmakkingum
- 2 vínsmakkingar á hotellinum
- Busstúrur til Torino
- Lán av el-súkklum
- Hugnakvøld aftaná nátturða á felags terrassuni hvørt kvøld, har Kim Hansen m.a. spælir og annað undirhald er okkurt kvøld

Eisini verður møguleiki fyri, at gera nøkur eyka tilval á túrinum fyri ein eyka kostnað. Her kunnu vit t.d. nevna: Vitja víngarðar í Barbaresco, vitja víngarðar í Barolo, vitja Grappa framleiðara, fara á trøffeljakt, taka italienskt matskeið og ymiskt annað.



WINE MAP OF PIEMONTE

ITALY

TOP VARIETIES

- Barbera
- Dolcetto
- Nebbiolo
- Brachetto
- Freisa
- Grignolino
- Muscat Blanc
- Cortese
- Chardonnay
- Arneis
- Erbaluce
- Timorasso

AREA UNDER VINE

138,000 acres
46,400 hectares (2010)

© 2016 Wine Folly
Made in Seattle, WA, USA

Map areas may appear larger than designated wine zones.

TORINO

BAROLO


BARBARESCO

ALBA

ASTI












L'aja della MIRUSINA



Her búgva vit á 4* resortini, L'Aja della Mirusina, ið hevur víngarðar rundanum seg í allar ættir. Resortin liggur eisini beint við vínbýin, Canelli, ið er kendur fyri Asti Spumante og Moscato d'Asti bobblur. Kømurini eru góð, rein og hugnalig, starvsfólkini á resortini eru blíð og hjálpsom, matstovan er sera góð og so er eitt lekkurt uttanum øki við svimjihyli og sólstólum. Eisini er ein barr og sera gott vínúrval. Fyri uttan púra vanlig kømur, er eisini møguleiki fyri at bókað stór kømur (t.d. eina íbúð við trimum kømurum, sum so deila baðirúm) til bindiklubbar, vinfólk, vinarpør ella familju og spara pening. Eisini ber til at bókað eitt dupultkamar við jacuzzi á terrassuni ella eitt dupultkamar við stórum baðikarið á loftinum og sauna í kamarinum. Vit hava bókað alla restortina, so ongin verður órógvaður av okkum.





MIRUSINA RESORT ****

PRÍSUR FYRI HVØNN Í DUPULTKAMARI:

12 STK DELUXE DUPULTKØMUR Á 14.495,-
(SUM EINKULTKAMAR 19.995,-)

1 STK TRIPLE SUPERIOR Á 14.495,-
(TRIÐI PERSÓNUR KOSTAR BERT 9.995,-)

2 STK SUPERIOR DUPULTKAMAR Á 14.495,-
(TRIÐI PERSÓNUR KOSTAR BERT 9.995,-)

1 STK FAMILY SUITE Á 15.995,-
(TRIÐI OG FJÓRÐI PERÓNUR KOSTA BERT 9.995,- HVØR)

2 STK PANORAMA & POOL SUPERIOR Á 18.995,-

1 STK PIEDMONT SAUNA & POOL SUITE Á 18.995,-

PRÍSUR FYRI HVØNN, UM 4 TIL 7 FÓLK BÚGVA SAMAN:


1 STK FAMILY SUITE SUPERIOR Á 12.995,-
(1 DUPULTSONG, UPP TIL 5 EINKULTSENGUR OG 2 RÚM)

1 STK JUNIOR SUITE Á 12.995,-
(2 DUPULTSENGUR, 2 EINKULTSENGUR OG 2 RÚM)







DELUXE DUPULTKAMAR

Er eitt væl innrætta kamar, sum kann nýtast sum eitt einkult- ella dupultkamar. Kømurini hava skáp, køliskáp, borð, stól, sjónvarp og vesi við brúsu, eru ljós og hava eina góða støddd.

12 stk
Deluxe dupultkømur á 14.495,-
(sum einkultkamar 19.995,-)





TRIPLE SUPERIOR

Er eitt væl innrætta kamar, sum er gjørt til trý fólk – tó er hetta ikki ein treyt. Kamarið hevur skáp, køliskáp, borð, stól, sjónvarp, vesi við brúsu og hevur eina eyka einkultsong inni og eina stóra terrassu við sitiplássum og borðið.

1 stk
Triple Superior á 14.495,-
(Triði persónur kostar bert 9.995,-)





SUPERIOR DUPULTKAMAR

Er eitt stórt kamar við góðari innrætting, har pláss er fyri at flyta seg. Kømurini hava skáp, skuffur, køliskáp, borð, stólar, sjónvarp og stórt vesi við brúsu, eru ljós og hava eina sera góða støddd.

2 STK
SUPERIOR DUPULTKAMAR Á 14.495,-
(TRIÐI PERSÓNUR KOSTAR BERT 9.995,-)





FAMILY SUITE

Er ein íbúð við tveimum kømurum og gongd, har allir hentleikar eru á hvørjum einstakum kamarið. Íbúðin er simpult innrætta við øllum hentleikum og hevur eitt vesi við brúsu. Sera gott kamar til 2 pør, til vinfólk ella til vaksin fólk við vaksnum børnum.

1 stk
Family Suite á 15.995,-
(triði og fjórði perónur kosta bert 9.995,- hvør)





PANORAMA & POOL SUPERIOR

Er eitt lekkurt kamar við jacuzzi, borð og stólum á stóru balkongini. Kamarið hevur skáp, køliskáp, borð, stól, sjónvarp og vesi við brúsu. Her kann ferian veruliga njótast úti á balkongini, við útsikt niðan á vínmarkir og svimjihylin.





2 STK PANORAMA & POOL SUPERIOR Á 18.995,-

PIEDMONT SAUNA & POOL SUITE

Er eitt stórt og lekkurt kamar í tveimum hæddum, har stór dupultsong og sauna er á 1. hædd og einkultsong og stórt baðikar er á 2. hædd. Hevur eitt eyka borð við tveimum stólum og hevur annars allar hentleikar og vesi við brúsu. Er passandi til trý fólk, men kann eisini brúkast til eitt par.





1 STK PIEDMONT SAUNA & POOL SUITE Á 18.995,-

SUPERIOR FAMILY SUITE

Er ein stór íbúð við tveimum kømurum og gongd, har allir hentleikar eru á hvørjum einstakum kamarið. Í kømurunum eru 3 songjarpláss í hvørjum (dupultsong + einkultsong ella tríggjar einkultsengur) og ein eyka uppreiðing kann gerast afturat, so tað blívur til 7 songjarpláss samanlagt. Íbúðin er simpult innrætta við øllum hentleikum og hevur eitt vesi við brúsu. Sera gott kamar til 4 til 7 fólk sum ferðast saman.





1 STK FAMILY SUITE SUPERIOR Á 12.995,- (MIN 4 PERS.)
(1 DUPULTSONG, UPP TIL 5 EINKULTSENGUR OG 2 RÚM)

JUNIOR SUITE

Er ein íbúð í tveimum hæddum, har dupultsong og ein eyka song standa í báðum hæddunum. Íbúðin er væl innrætta við øllum hentleikum og hevur eitt vesi við brúsu. Sera gott kamar til 2 pør, til vinfólk ella til vaksin fólk við vaksnum børnum.





1 STK JUNIOR SUITE Á 12.995,- (MIN 4 PERS.)
(2 DUPULTSENGUR, 2 EINKULTSENGUR OG 2 RÚM)



Her búgva vit á 4* Sunstar Hotel Piemonte, ið liggur uppi á einum bakka og inni í lítlu bygdini, Villa. Útsiktin er sera góð útyvir vínmarkir, bakkar og smærri bygdir. Her er stuttur súkkluavstandur til víngarðar og bygdir, ið hava ymiskt spennandi at bjóða uppá. Kømurini eru sera góð, rein og flott og starvsfólkini eru sera fólkslig og hjálpsom. Á hotellinum eru tvær sera góðar matstovur, ein vínkjallari og ein Grappa barr. Eisini er ein lekkur svimjihylur við tilhoyrandi sólstólum og nógvir fínir krókar eru ymsastaðni, so til ber at trekkja seg og bara njóta útsiktina, eitt glas av víni ella eina øl. Fyri uttan vanlig standard kømur, ber eisini til at bíleggja flott og lekkur Ambiente dupultkømur, junior suite, suite ella eina flotta íbúð. Vit hava bókað alt hotellið, so ongin verður órógvaður av okkum.





SUNSTAR HOTEL PIEMONT ****

PRÍSUR FYRI HVØNN Í DUPULTKAMARI:

4 STK STANDARD DUPULTKAMAR Á 15.995,-
(SUM EINKULTKAMAR 24.995,-)

6 STK DUPULTKAMAR CLASSIC Á 16.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-)

8 STK DUPULTKAMAR AMBIENTE Á 16.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-)

2 STK JUNIOR SUITE Á 17.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-)

4 STK JUNIOR SUITE V/BALKONG Á 18.995,-

1 STK SUITE Á 20.995,-
(EYKA UPPREIÐING Á SOFU 10.995,-)

2 STK LOFT SAN MICHELE ÍBÚÐ Á 21.995,-
(EYKA UPPREIÐING Á SOFU 10.995,-)










STANDARD DUPULTKAMAR

Eru rustikk og hugnalig dupultkømur á 25 m2 við útsikt yvir bygdina. Kømurini hava skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Lekkur standard dupultkømur, sum ikki mangla nakað.

STANDARD DUPULTKAMAR Á 15.995,-
(SUM EINKULTKAMAR 24.995,-)



CLASSIC DUPULTKAMAR

Eru elegant og rúmlig dupultkømur á 30 m2 við útsikt yvir bygdina ella yvir víngarðar. Kømurini hava stól, borð, skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Eru eitt niveau upp frá standard kømurunum.

CLASSIC DUPULTKAMAR Á 16.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-









AMBIENTE DUPULTKAMAR SAN MICHELE ANNEX

Eru nýmótans og stílfull dupultkømur á 30 m2 við útsikt yvir bygdina. Kømurini hava stól, borð, skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Eru eitt niveau upp frá standard kømurunum. NB! Fyri at koma til hesi kømurini má gangast upp ígjøgnum trappur.

DUPULTKAMAR AMBIENTE
Á 16.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-)







AMBIENTE DUPULTKAMAR SCUDERIA ANNEX

Eru nýmótans og stílfull dupultkømur á 30 m2 við útsikt yvir bygdina. Kømurini hava stól, borð, skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Eru eitt niveau upp frá standard kømurunum. NB! Fyri at koma til hesi kømurini má gangast upp ígjøgnum trappur.

DUPULTKAMAR AMBIENTE
Á 16.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-)









JUNIOR SUITE

Eru sera rúmlig, serstøk og elegant dupultkømur á 40 m2 við útsikt yvir bygdina ella víngarðar. Kømurini hava stól, borð, skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Eru enn eitt niveau upp frá Classic og Ambiente kømurunum.

JUNIOR SUITE Á 17.995,-
(EYKA UPPREIÐING 10.995,-





JUNIOR SUITE VIÐ BALKONG

Eru sera rúmlig, serstøk og elegant dupultkømur á 40 m2. Kømurini hava stóra ella hálvstóra balkong við borðið og stólum, og hava sera góða útsikt yvir bygdina og víngarðar. Kømurini hava stól, borð, skáp, køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp, vesi við bidet, brúsu og fønara. Eru enn eitt niveau upp frá Classic og Ambiente kømurunum.







JUNIOR SUITE V/BALKONG Á 18.995,-



SUITE

Bert ein Suite er á hotellinum. Er sera, sera rúmlig við sínum 70 m2 og er innrætta í flottum baroc stílið, sera flott og elegant. Útsikt er yvir bygdina og yvir víngarðar. Suite'in er uppdeild í kamarseind, stovu við sofu og vesi við baðikarið. Nógv sitipláss og gott skápspláss er eisini. Kamarið hevur køliskáp, kaffimaskinu, sjónvarp, útvarp og fønara á vesinum. Hetta er eitt serstakt kamar.







SUITE Á 20.995,-
(EYKA UPPREIÐING Á SOFU 10.995,-)

LOFT SAN MICHELE ÍBÚÐ

Tvær nýmótans íbúðir eru á hotellinum á 50 m2 og tær eru báðar innrættaðar í tveimum hæddum. Útsikt er yvir víngarðar í báðum íbúðunum. Á 1. hædd er stova við sofu, spísiborðið og stólum. Eisini er vesi við brúsu og fønara. Á 2. hædd er dupultsong og ein gongd, har tú sært niður í stovuna. Í íðúðunum eru køliskáp, kaffimaskina, sjónvarp, útvarp og fønari á vesinum. Her býr mann sera væl.







LOFT SAN MICHELE ÍBÚÐ Á 21.995,-
(EYKA UPPREIÐING Á SOFU 10.995,-)



Eisini verður møguleiki fyri, at gera nøkur eyka tilval á túrinum fyri ein eyka kostnað. Her kunnu vit t.d. nevna: Vitja 2 víngarðar í Barbaresco, vitja 2 víngarðar í Barolo, vitja Grappa framleiðara, fara á trøffeljakt, taka italienskt matskeið og ymiskt annað.









